TVØROYRAR KOMMUNA

# Dagrøktin í Tvøroyrar kommunu

Søkt verður eftir dagrøktara til ansing av børnum í Hvalba í ½ tíð seinnapart

**Vit vænta av tær:**

- At tú hevur góðar umstøður, at hava børn, bæði inni og uttanfyri..
- At tú tekur ábyrgd og kanst arbeiða sjálvstøðugt.
- At tú vísir viðring fyri børnunum,foreldrum og starvsfeløgum.
- At tú ert álítandi og hevur góð samstarvsevnir.
- At tú ert tolin og vísir umsorgan.
- At tú hevur hegni og áhuga í at menna børnini.
- At tú dugir at sýggja møguleikar í staðin fyri forðingar.
- At tú hevur roykfrítt og viðkvæmisvinarligt heim.

Í dagrøktarskipanini í Hvalba starvast 6 dagrøktarar og ein leiðari.

Talið av børnum í dagrøktini eru 27 børn

Ein dag um vikuna eru dagrøktarnir saman við børnunum í spælistovuni.

Arbeiðstíðin er ímillum 7.30 – 17.15

Vit kunnu bjóða tær starv í góðum og tryggum arbeiðsumstøðum, við góðum og álítandi samstarvsfeløgum

Dagrøktarar eru løntir eftir sáttmála millum Føroya Arbeiðarafelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til dagrøktarleiðaran í Tvøroyrar kommunu á tlf. 211339 og tosa við dagrøktarleiðaran Súsannu Poulsen

**Umsóknarfreist: 17 apríl 2008, kl.16.00**

Vinarliga send umsókn tygara til

**Tvøroyrar kommunu**
Dagrøktarskipanin
800 Tvøroyri

IRF
*– heilt og reint*

# Ruskinnsavnari til »Rósu«

IRF søkir við hesum eftir einum ruskinnsavnara til innsavningarbilin »Rósu« at byrja mánadagin 28. apríl 2008.

Talan er um eitt fulltíðarstarv, sum m.a. fevnir um:

- Innsavnan av húsarhaldsposum og virkisposum v.m. í meginøkinum.
- Annað fyrifallandi arbeiði hjá IRF

Hevur tú stóra koyrikortið, ert vanur at koyra lastbil, kanst arbeiða sjálvstøðugt og hevur góðan ordan, ert tú møguliga tann, vit søkja.

Tann, ið settur verður í starv, kann eisini rokna við øðrum uppgávum innan IRF.

Starvið er lønt sambært fastlønarsáttmálanum millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til IRF tlf. 414243, Jógvan Júst Olsen.

Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi innan mánadagin 21. apríl 2008.

***IRF***
*Postboks 39*
*520 Leirvík*

IRF hevur 5 serútgjørdar bilar til ruskinnsavning: Roði, Ryski, Rósa, Reyðsmæra og Viól. Arbeiðsumráðið hjá »Rósu« er í meginøkinum. Tríggir mans eru við bilinum.

# Farloyvisfólk til Radiohandilin

Vegna farloyvi søkja vit eftir einum røskum og álítandi fólki til handilin í Niels Finsens gøtu í Havn frá 1. mai 2008 til 1. juli 2009.

Arbeiðið í Radiohandlinum fevnir um kundarøkt, at selja radio, sjónvarp, parabolar og annars alt, sum er at fáa í okkara handli.

Tú skalt kunna seta tól upp og seta tey til úti hjá kundum.

Tú skalt hava koyrikort, og tú skalt kunna arbeiða sjálvstøðugt.

Tað er ein fyrimunur, at tú veit nakað um elektronisk tól, men tú kanst annars læra tað her.

Hevur tú hug at arbeiða hjá okkum, so lat okkum hoyra frá tær. Ring 318277 og spyr eftir Pola ella Echardt.

RADIOHANDILIN
v/E. & P. Persson sp/f N. Finsensgøta 16 - Tlf. 318277

## LÆRLING TIL RADIOVERKSTAÐ

Hevur tú hug at útbúgva teg til radiomekanikara, hava vit eitt læripláss tøkt frá **2/6-2008**

Arbeiðið umfatar umvæling og tænastu innan elektronisk tól, so sum sjónvarp, radio og mangt annað. Eisini er ein partur av arbeiðinum beinleiðis samskifti og avgreiðsla av kundum.

Arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna.

Lærutíðin er 4 ár, men um umsøkjari hevur SIT prógv er møguligt at søkja um at fáa stytt læru og skúlatíð, skúlagongdin er á tekniskum skúla í Danmark.

Fyrimunir er um umsøkjari hevur SIT prógv

Hevur hetta tín áhuga, so send okkum eina umsókn saman við prógvum og viðmælum innan **15/04-2006**

DELTA
ELEKTRONIKTÆNASTAN
GONGIN 1 • BOKS 67 • FO-110 TÓRSHAVN • TLF. 318050

## HEVUR TÚ EINA GÓÐA SØGU?




FAROE DIVE.fo




# Stoypa grund?

**Manglar tær at fáa grundina stoypta, garðin ella hjallin, eru vit tey tú manglar.**

**Ring og fá eitt óbindandi tilboð.**

**Vit gera alt stoypiarbeiði – stórt sum smátt.**

**J.J. Betong**

**Tlf. 21 20 90 ella 44 78 90**